Í Býin

# Sjálvtøka á Sjómansheiminum



*Matstovurnar, sum bjóða heitar rættir um middagsleitið, gerast alt fleiri. Hetta fyribrigdið, sum á útendskum málið verður nevnt lunch, er at finna á matskráunum hjá fleiri og fleiri matstovum. Ein tann seinasta, sum komin er við í flokkin, er Hotel Tórshavn, Sjómansheimið, í Havn*

**Hevur tú at fara út at fáa tær ein heitan bita um middagsleitið, er sjálvtøkuborðið á Hotel Tórshavn, Sjómansheiminum, ein møguleiki**

Í BÝIN
*Edvard Joensen*
*Myndir: Jens K. Vang*

Hotel Tórshavn, Sjómansheimið, bjóðar eisini heitan sjálvtøkumat á middegi. Úrvali er minni, enn tað, roynt er á øðrum líknandi støðum í býnum, men maturin smakkar væl.

Matstovurnar, sum bjóða heitar rættir um middagsleitið, gerast alt fleiri. Hetta fyribrigdið, sum á útendskum málið verður nevnt lunch, er at finna á matskráunum hjá fleiri og fleiri matstovum. Ein tann seinasta, sum komin er við í flokkin, er Hotel Tórshavn, Sjómansheimið, í Havn.

Sjómansheimið hevur verið undir støðugari umbygging í longri tíð. Kjallarin er gjørdur til hugnaligt pizzaria. Kømurini eru broytt frá tí gamla, ikki serliga tíðarhóskandi, sjómansheiminum til eitt veruligt hotel. Og nú er matstovan á fyrstu hædd eisini latin uppaftur, eftir at hon er umbygd fullkomuliga.

Matstovan Gallan, sum hon nú eitur, er stutt sagt als ikki sama rúmið at koma inn í eftir umbygg-ingina. Ljóst og lætt.

Tað er ikki nógv fólk inni, tá vit koma. Nøkur fólk um miðan aldur sita við ymsu borðini fram við vindeygunum. Mitt á gólvinum er tómt, so trupulleiki er eingin at fáa borð.

Men vit vilja fegin hava eitt vindeygaborð, og tað er heldur eingin trupulleiki. Vit sessast við eitt slíkt yvir móti Bryggjubakka og síggja alt, sum fyriferst fyri uttan.

Men nú er hetta sjálvtøka, so ikki verður sitandi leingi, áðrenn farast skal upp at fáa sær upp á borðiskin.

Sanni beinanveg, at úrvalið er minni, enn eg havi sæð á øðrum støðum, sum bjóða lunch.

Føst matskrá er løgd. Ein fyri hvønn dag í vikuni, skilst. Í dag er tað steikt svínakjøt við tilhoyri. Talan er um kryddrað kjøt, sum smakkkar óføra væl. Tilhoyrið er rættiliga tradionelt. Hvít og brún epli, reyðkál, bønir og sós.

Salatborð er eisini við í tilboðnum. Gott salatborð við pasta og dressing, sum tú kanst fáa tær av, sum tær lystir.

Hotel Tórshavn er missiónshotel, og skeinkiloyvi er einki. Ikki tí at tey, sum koma her, tykjast hava so øgiligan tørv á tí. Og tað, sum fæst at drekka aftur við matinum, er eisini sodavatn ella juice. Tú kanst velja millum kranarnar í eini sodavatnsautomat ella kannur við ymsum juicesløgum, mjólk ella vatni, sum standa á borðinum.

Tað var, sum vera man, skjótt a velja rættir upp á borðiskin. Og sigast má, at hóast talan beinleiðis er um cafeteriamat, Sjómansheimið bjóðar á middegi, er hann góður.

Smakkur og góðska annars er í fínasta lagi. Og maturin var heitur, sum ein eigur at kunna vænta og krevja, hóast tað ikki altíð er so á slíkum støðum.

Umhvørvið er gott at sita í. Friðaligt, um sæð verður burtur frá serføroyska fyribrigdinum, at tá etið verður, skal Útvarpið vera so hart frá, at neyvan hoyrist mannamál. Øll vilja hoyra veðurtíðindini og tað, sum aftan á kemur. Men tá liðugt er, veit vanliga næstan eingin, hvat sagt varð.

Soleiðis var eisini her á Sjómasheiminum hendan dagin beint eftir ólavsøku.

Hugsaði meðan eg sat og át, at helst verður hetta gjørt sum tænasta til tey, sum eru her og eta. Mest tilkomin fólk.

Onkur einsamallur. Aðrastaðni pør. Helst hjún, sum hava tikið sær nakrar frídagar og halda til her. Ein kundi mestsum gita sær til, at hetta vóru ólavsøkugestir, sum ivaleyst eru komnir av bygd og hava buð á Sjómansheiminum um ólavsøkuna. Tá soleiðis er, ger tað kanska minni, um uppihaldið varar einar tveir dagar ella so eyka.

Rúmið er ljóst og rúmligt. Góð luft inni. Eingin roykur. Men framvegis er útvarpið rættiliga hart frá, eftir at tíðindi og kunngerðir eru liðug. Nú verður spældur blandaður, føroyskur tónleikur, sum eg ikki eri heilt sannførdur um er av slíkum slagi, sum hesi fólkini dagliga lurta eftir.

Oman á døgurðan hoyrir eisini ein kaffimunnur til traktementið. Og her kom veruliga fyri dagin, at talan er um cafeteria.

Afturvið kaffinum stendur valið millum jarðberjagreyt við mjólk og sukuri, ella kransakøkustykki. Vit velja kransakøkuna.

Men kaffi er at fáa úr eini automat, har eitt pappbikar verður sett undir, áðrenn trýst verður á knøttin. Ikki júst tað, ein væntar, tí talan er hóast alt um eitt hotel.

Hinvegin er at siga, at hesin møguleikin á middegi er lunch ella cafeteriatilboð.

Við tí í mentu kann sigast, at hóast eitt sindur av hugflogi kundi verið afturat, smakkar maturin rættiliga væl. Hann er heitur, og góðskan tykist vera í lagi.





Í Býin


Nýtt Nýtt Nýtt Nýtt Nýtt Nýtt Nýtt Nýtt

Morgunmatur á Café Natúr
mánad.- leygard. kl. 09.00 til 11.00

| | |
|---|---|
| Morgunbreyð & 1 rugbeyðflís<br>v/ kaffi/te<br>Vel ímillum ost, skinku, salami, rullupylsu, nutella og súltutoy | 40,- |
| Cornflakes<br>v/ rosinum & frukt | 22,- |
| Jogurt<br>v/ músli<br>Vel ímillum jarðber ella peru/banan | 22,- |
| Wienarbreyð | 12,- |
| Pannukøkur<br>v/ ísi ella róma | 25,- |
| Kirsuberterta<br>v/ róma ella súrróma | 25,- |

CAFÉ NATÚR
livandi tónleikur —— Tlf. 31 26 25



HESA VIKUNA
DJ Coyote — Hóskvøldið
Martin Kjærbo — Fríggjakvøldið — ladies night
Høgni Zakariasen — Leygarkvøldið
Sunnukvøldið »KARAOKE«
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM 69,–
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 2. august
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 3. august
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
Flúrar spæla

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Vestmanna
Leygarkvøldið :
• Vestm.-Tórsh. kl. 20.50
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 24.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30 frá City
(Koyrt verður um Kvívík)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Bussarnir: Tlf. 286254

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Strendur
Leygarkvøldið:
• Tórsh.-Strend. kl. 21.45
• Strend.-Tórsh. kl. 23.00
• Tórsh.-Strend. kl. 04.30 frá City
(Steðga verður við steðgiplássini hjá bussleiðini og bygdaleiðir á vegnum aftur og fram)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Bussarnir: Tlf. 287752

Kaggin
Dansur verður í vikuskiftinum
Sosialurin - 311820
KAGGIN
www.kaggin.fo

fk Matseðilin
Hósdagin 2. august: kjøtdrýlur
Fríggjadagin 3. august: búffsteak
Leygardagin 4. august: oksasteik
Mánadagin 6. august: kjøtfrikadellir
Týsdagin 7. august: roykt ar medistarpylsur
Mikudagin 8. august: karbonadir
Kostnaður 35,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík



petur & petur • 320870
fríggjakvøldið Eyðun & Terji við manning
leygarkvøldið Eyðun & Terji við manning
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque

Felagið Tórshøll
Dansur verður í vikuskiftinum
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Nú fleiri ódyrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

AUTO
-Dag sum nátt-
-skjótt og gott-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
-ALT DØGNIÐ-
Skal tú bil hýra
-so er tað 311234
AUTO
311234

Les í býin hvønn hósdag !

www.sosialurin.fo